# Løgið flóðaldufyribrigdi

**- Hetta var óhugnaligt. Tað byrjaði við súði, og síðani kom ein slík flóðalda, at vatnstøðan øktist millum 2,5 og 3 metrar. Sjógvurin kom heilt niðan í túnið hjá mær, og ein stór tunga lá eftir, tá sjógvurin fór út aftur, sigur Richard Johannesen í Hvannasundi**

FLÓÐALDA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seinnapartin í gjár vóru fólk í Hvannasundi vitni til eitt undarligt fyribrigdi, sum minti um eina flóðaldu. Tað var dýrdarveður, men knappliga fór at súða, og síðan setti nógvur sjógvur inn í sundið sunnaneftir.

Fólk í Hvannasundi meta, at frá tí, at vatnstøðan var lægst, tá sjógvurin dró út úr sundinum, til hon aftur var í hæddini, var ein munur upp á einar 2,5-3 metrar. Tá vatnstøðan var hægst, stóð sjógvur niðan móti egningarskúrunum í bygdini, og tá fjaraði aftur, stóðu bátar á turrum botni, og fiskur spraklaði í fjøruni.

Rákið í sundinum broyttist nógv, meðan fyribrigdi vardi.

Eftir at byrging er løgd út í Hvannasund, hevur lítið rák verið í sundinum, tí sjógvur bert sivar um byrgingina. Onkur bátur, sum var sunnanfyri byrgingina, tá fyribrigdi fór fram, gekk ikki fyri seið, so hart sum tað fór at reka. Onkur heldur, at rákið, tá tað var harðast, var einar seks míl. Onkur annar heldur, at tað kanska var heilt uppí einar 8 míl.

Í Hvannasundi gjørdust fólk rættiliga bilsin av tí, sum hendi, og fólk fóru at seta sær spurningar um orsøkina. Í fyrstani hugsaðu fólk, at byrgingin kanska var skrædnað, og í aðrar mátar kundi talan kanska vera um omanlop onkustaðni, sum hevði sett nógvan sjógv inn í sundið.

Skjótt vistu hvannasundsmenn, at byrgingin var heil, og tá ringt varð til fólk í oyggjunum nærindis, og samband hevði verið við fólk, sum vóru á báti í Hvannasundi, gjørdist eisini greitt, at flóðaldan heldur einki hevði við omanlop at gera.

Fólk í Hvannasundi siga seg ikki hava upplivað slíkt áður ein slíkan góðveðursdag hesa tíðina av árinum.

Sum skilst, vardi fyribrigdi í Hvannasundi í umleið ein hálvan tíma, men eingin veit við vissu at siga, hvør orsøkin var.

Mest nærliggjandi er tó at hugsa sær, at eitt hvørt er hent við botninum, og her hugsa fólk í Hvannasundi í fyrsta lagi um møguligt omanlop ella aðrar forskjótingar.

Um ringast vildi til, kundi fyribrigdi í Hvannasundi kostað mannalív, tí tað er vanligt, at børn spæla dygst við sjóvarmálan. Tá vatnstøðan broyttist so nógv, sum hon gjørdi, kundi vandi staðist av hesum, um illa vildi til.

Ein eldri maður í Hvannasundi, Richard Johannesen (79), sigur við Norðlýsið, at tá sjógvurin dró útaftur úr sundinum, lá ein sprellivandi tunga í túninum hjá honum.

Flóðaldu-fyribrigdi í Hvannasundi var so ógvusligt, at fleiri bátar stóðu uppi á turrum eina góða løtu.

Sjógvurin var myrkur og luktaði skitin, og her halda fólk í Hvannasundi, at tað er dálking frá alivinnuni í sundinum, sum ruskaðist upp av botninum og kom inn við alduni.

- Hetta var óhugnaligt at síggja í góðveðrinum. Tað byrjaði við súði, og síðani kom ein slík flóðalda, at vatnstøðan øktist millum 2,5 og 3 metrar. Sjógvurin kom heilt niðan í túnið hjá mær, og ein stór tunga lá eftir, tá sjógvurin fór út aftur. Eg tók hana og legði hana í eitt kar, og her hevur hon tað fínt. Fiskur sprellaði allastaðni á turrum botni, tá sjógvurin fór út aftur, sigur Richard Johannesen í Hvannasundi.

Norðlýsið var so beinasamt at læna Sosialinum myndir, sum Sverri Christiansen og Kristian Petersen hava tikið.





*Bátar í Hvannasundi stóðu á turrum botni, og fiskur spraklaði í fjøruni seinnapartin í gjár*

# Hvat við hinum 13?

SØLVI REINERT HANSEN
Ítróttasamband Føroya



Ítróttasamband Føroya fegnast um, at tvey av okkara 15 sersambondum sambært tilmælinum hjá meirilutanum í Fíggjarnevndini hava fingið hækkað játtanina við kr. 100.000,-.

Men hvat við hinum 13? Sersambondini hava øll altjóða virksemi, og luttaka kvinnur á jøvnum føti við menn í øllum ítróttagreinum. Onkur sersambond hava altjóða nevndarsessir, meðan onnur hava tikið á seg at skipa fyri stórum altjóða kappingum í Føroyum.

Seinasta ár fekk Ítróttasambandið játtað kr. 400.000,- til altjóða samstarv. Lyftið hjá Fíggjarnevndini var tá, at hendan játtanin skuldi gerast ein árligur stuðul til altjóða virksemið hjá øllum føroyskum ítrótti.

Uttan at umrøða málið við Ítróttasamband Føroya hevur meirilutin í Fíggjarnevndini nú einvegis skotið upp at hækka játtanina hjá tveimum útvaldum sersambondum. Ítróttasamband Føroya átalar, at Fíggjarnevndin soleiðis leggur seg út í innanhýsis peningabýtið hjá Ítróttasambandi Føroya.

ÍSF vil fegið hava at vita frá Fíggjarnevndini, undir hvørjum fortreytum ætlaða broytingin verður framd. Sum landsfelagsskapur varðar Ítróttasambandið av øllum ítróttagreinum og kann tí ikki loyva sær at gera mun á ítróttagreinunum.

Ítróttasambandið kennir heldur einki til nakra greining av føroyskum ítrótti og virkseminum hjá ymisku sersambondum, sum kann liggja sum grund fyri hesi uppíleggingini frá Fíggjarnevndini.

Játtanin til rakstur av Ítróttasambandi Føroya og sersambondunum hevur staðið í stað í eini 20 ár. Ítróttasambandið hevur ár eftir ári sent eina grundaða umsókn inn um hægri játtan, uttan at Løgtingið hevur latið við seg koma.

Royndin hjá Fíggjarnevndini at leggja seg úti innanhýsis peningabýtið hjá Ítróttasambandinum er óseriøs og má átalast. Detailstýringin hjá Fíggjarnevndini er ein greið niðurgering av tí demokratisku skipanini innan Ítróttasamband Føroya, sum hvørt ár í sátt og semju býtir tøka peningin millum Ítróttasambandið og ymsu ítróttagreinirnar.

Ítróttasamband Føroya vil samstundis heita á Fíggjarnevndina og landsmyndugleikar annars at samskifta við Ítróttasamband Føroya, sum er landsfelagsskapur hjá øllum føroyskum ítrótti, og tí hevur samráðingarrættin vil landsmyndugleikarnar.

Um almennu myndugleikarnir ikki virða leiklutin hjá Ítróttasambandinum sum landsfelagsskap, mugu teir fyrireika seg til umsóknir og trýst frá hvørjari ítróttagrein sær. Talið á teimum er í løtuni 25 og er tíbetur vaksandi.